Álit

í

løgtingsmáli nr. 66/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta-og smápartafeløg (Vinnufelagalógin), anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder (Vinnufyritøkulógin), anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde og í løgtingslóg um tryggingarvirksemi
(Innheinting og skráseting av upplýsingum um veruligar eigarar, tvingsilsavtøka o.a.)

Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum, Høgni Hoydal, hevur lagt málið fram 13. februar 2024, og eftir 1. viðgerð tann 15. februar 2024 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 28. februar 2024.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við Vinnuhúsið og landsstýrismannin í uttanríkis- og vinnumálum, Høgna Hoydal.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Hetta lógaruppskotið er ein partur av at kunna lúka treytirnar í hvítvaskdirektivunum hjá EU. Í stuttum er talan um, at vit skulu skráseta veruligu eigararnar í øllum vinnufyritøkum og útvaldum vinnurekandi grunnum og broytingar í eigaraskapi, so hvørt sum tær henda.

Nevndin heldur tað verða av týdningi, at vit hava somu lóggávu á hesum øki sum okkara grannalond. Endamálið er bæði at skapa fult gjøgnumskygni í eigaraviðurskiftum í føroyskum fyritøkum, men eisini at forða fyri møguleikanum at hvítvaska pening ígjøgnum eigaraskap í føroyskum feløgum.

Skrásetingarmynduleikin er Skráseting Føroya, sum við hesi lóg skal standa fyri skrásetingini. Skráseting Føroya fær eisini atgerðarheimild, um so er, at feløg ikki halda sína skyldu at boða frá um eigaraskap og eigaraskifti. Heimildin umfatar møguleikan fyri, í ringasta føri, at kunna senda feløg til avtøku í Skiftirættinum, um tey eftir áhaldandi áminning ikki lata myndugleikanum kravdu upplýsingarnar.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 7. mars 2024

Erhard Joensen
formaður

Annika Olsen
næstforkvinna

Eyðdis Hartmann Niclasen

Jørgen Niclasen

Árni Skaale

Uni Holm Johannesen

Karlot Hergeirsson